Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Tórshavn 27.10.2020

Hoyringssvar til uppskot til løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin)

Heilsuhjálparafelag Føroya, hevur fingið omanfyristandi uppskot til hoyringar, og hava vit hesar viðmerkingar til uppskotið:

§ 1, nr. 10

Eftir galdandi lóg er arbeiðsloysisstuðul pr. dag 75% av útrokningargrundarlagnum (móttikna A-inntøkan seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn arbeiðsloysið er staðfest), býtt við 253. Broytingin hevur við sær, at arbeiðsloysisstuðul pr. dag verður 80% av útrokningargrundarlagnum, býtt við 253.

Heilsuhjálparafelag Føroya tekur undir við hesari hækking.

Í § 16, stk. 2, 1. pkt. verður tað gjørt greitt, at eftirlønargjald skal leggjast afturat arbeiðsloysisstuðlinum.

Heilsuhjálparafelag Føroya tekur undir við broytingini í ALS lógini, hetta so at arbeiðsloysisstuðulin ikki minkar við tí upphædd, ið verður rindað til eftirløn.

Annars hava vit ikki aðrar viðmerkingar til uppskotið.

Heilsuhjálparafelag Føroya

_____

Mary Antonsdóttir, forkvinna

Ása Olsen, fyrisitingarleiðari

Fr. Petersensgøta 7 · FO-100 Tórshavn
Telefon 317725 · Fax 319117 · email: hhff@hhff.fo · heimasíða.: www.hhff.fo